
Vel tryggleika, vælferð og menning
Vel Sambandsflokkin á Fólkating
Sambandsflokkurin

# Góðu føroyingar

Vit skulu hava eina greiða, sterka og semju-søkjandi føroyska rødd á Fólkatingi, har vit gera okkara ávirkan galdandi í øllum, sum viðvíkur Føroyum.



**Bárður á Steig Nielsen**
formaður í Sambandsflokkinum

Sambandsflokkurin er einasti flokkur, sum gongur fult inn fyri ríkisfelagsskapinum, og tíðin prógvar, at henda politiska leið er trygg og mennandi fyri tjóðina. Serliga tryggleikin er lyklaorðið í nýggja veruleikanum, vit í dag liva í. Ein veruleiki, ið er merktur av ótryggleika.

Vit liva í eini tíð, har tað hevur týdning at samstarva við onnur lond og taka lut í felagsskapum, sum eru grundaðir í londum við somu virðing fyri fólkaræðinum og fría heiminum, sum vit hava bygt okkara samfelag á.

Tað er harumframt í sterka ríkisfelagsskapinum, at vit hava teir bestu politisku møguleikarnar at varðveita og menna vælferðarsamfelagið.

Sum ríkisborgarar hava vit júst somu møguleikar sum øll onnur í ríkinum, og hetta er stórur fyrimunur fyri allar føroyingar, bæði fyri borgarar og vinnuna. Ikki bara í ríkisfelagsskapinum, men í øllum Evropa.

Við Sambandsflokkinum á odda í landsins leiðslu og á Fólkatingi hava vit bestu møguleikar at menna okkara samfelag.

**Vel tryggleika, vælferð og menning.**
**Vel Sambandsflokkin á Fólkating.**

Gott val.



# Hjartamál
# í ríkisfelagsskapinum

Sambandsflokkurin vil hava framhaldandi modernisering og virkna menning av ríkisfelagsskapinum. Vit skulu gagnnýta møguleikar okkara millum, beina burtur markaforðingar og styrkja samstarvið millum londini.

## Uppgávan hjá okkara umboði á Fólkatingi

- Virka sum bindilið millum danskar og føroyskar myndugleikar
- Umboðið hjá Sambandsflokkinum á Fólkatingi skal slóða fyri teimum málum, sum vit hava í felag, og luttaka í samráðingum um hesi mál
- Tryggja samstarv og samskifti við áhugabólkar
- Umboða Sambandsflokkin í Fólkatinginum og samskipa arbeiðið við tað, sum hendir politiskt í Føroyum
- Hava eftirlit og fylgja upp málum, sum hava týdning fyri Føroyar
- Hjálpa føroyingum og føroyskum feløgum og vinnuvirkjum, sum hava áhugamál í Danmark, umframt at hjálpa dønum og donskum fyritøkum, sum hava áhugamál í Føroyum
- Skipa fyri ráðstevnum og kunnandi virksemi um Føroyar og føroysk áhugamál sum t.d. "Føroyar á geopolitiska heimskortið".

# Hví skal eg velja **Sambandsflokkin á Fólkating?**



**Sambandsflokkurin hevur stórar politiskar ætlanir á Fólkatingi, sum á mangan hátt hava eitt í felag – tryggleika.**

Tryggleika í breiðastu merking. Umvegis ríkisfelagsskapin eru Føroyar partur av NATO, sum í hesum døgum er háaktuellur felagsskapur, ið verjir vesturlendsku virðini í hesi ótryggu tíð, nú kríggj aftur er í Evropa. Sambandsflokkurin hevur sum einasti flokkur altíð hildið fast um, at vit eru partur av Vesturheiminum, har NATO er okkara skansi.

Men tað snýr seg eisini um annan tryggleika. Viðgerðartrygdin skal vissa, at allir føroyingar hava atgongd til skjóta viðgerð í danska sjúkrahúsverkinum, og at sjúklingar úr Føroyum hava javnsett rættindi við aðrar borgarar í ríkinum, tá ið tað ræður um heilsuviðgerð.

Vit skulu tryggja okkara vælferð. Tryggja, at okkara ungu altíð hava møguleikan at fara undir lesnað, har tey vilja.

Ríkisfelagsskapurin er eisini vissa fyri búskaparligu trygdini í Føroyum, sum hevur við sær, at Føroyar kunnu fara undir størri verkætlanir. Harumframt veitir henda búskapartrygdin føroysku familjuni lægri rentu, so at hon hevur meira at liva av hvønn mánað.

# **Sambandsflokkurin** setur sjóneykuna á millum annað hesi ítøkiligu øki:

### Altjóða samstarv og uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikkur

- Virka fyri, at Føroyar fáa størri uttanríkispolitiskt rásarúm í málum, ið bert viðvíkja Føroyum.
- Tryggja ein virknan føroyskan leiklut í uttanríkis-, trygdar- og verjumálum, serliga tá ið ræður um spentu støðuna í Arktis og Norðuratlantshavi.
- Vinna Føroyum sjálvstøðugan sess í Norðurlandaráðnum.
- Víðka um handilssáttmálan við ES, so at føroyingar kunnu innflyta meirviðgjørdar fiskivørur. Hetta kann virðisøkja og tvífalda útflutningin.
- Arbeiða fyri at stovna eitt parlamentariskt samstarvsráð millum ríkispartarnar.
- Virka fyri at fáa ein føroyskan ambassadør fyri Arktis.

### Tryggur búskapur

- Tryggleiki í føroyska búskapinum, har ríkisfelagsskapurin hevur ein týðandi leiklut fyri styrkismetingina av føroyska búskapinum.

### Umhvørvis- og veðurlagsgransking

- Fíggingin til havgransking í Norðuratlantshavi eigur at halda fram og gerast til eitt varandi átak.
- Sambandsflokkurin fer at virka fyri, at ríkisfelagsskapurin stovnar ein havgranskingarstovn í Føroyum.

### Heilsupolitikkur

- Styrkja samstarvið millum heilsuverkini og gera gagn av stórrakstrarfyrimunum.
- Javnseta rættindini hjá avvarðandi at føroyskum sjúklingum í Danmark við donsk avvarðandi.

### Hægri útbúgvingar

- Styrkja samstarvið millum føroyskar og útlendskar skúlar og hægri lærustovnar fyri at menna og fjøltátta útbúgvingarmøguleikarnar í Føroyum.
- Styrkja rættindi hjá lesandi, sum útbúgva seg í Danmark og í øðrum londum.

### Løgregla og kriminalforsorg

- At tryggja, at avtalan um at byggja nýtt fongsul í Føroyum verður hildin, og at kriminalforsorgin í Føroyum verður raðfest.
- Føroyska og danska løgreglan skulu javnsetast. Eisini skulu vit virka fyri meira nærløgreglu í Føroyum.

### Mentanarpolitikkur

- Arbeiða við at tryggja øllum okkara ítróttargreinum altjóða viðurkenning og harvið møguleika at kappast sjálvstøðugt í altjóða kappingum.
- Áhaldandi styrkja sambandið millum ung í ríkisfelagsskapinum, t.d. víðka Sjómaq verkætlanina.

# Eitt lið
# **Ein flokkur**



**Haraldur** Símunarson Hammer



**Kaj Leo** Holm Johannesen



**Anna** Falkenberg



**Erhard** Joensen



**Helgi** Abrahamsen



**Magnus** Rasmussen



**Bárður** á Steig Nielsen



**Eyðdis** Hartmann Niclasen



**Jaspur** Langgaard



**Petrina** Berg á Lag



**Edva** Jacobsen



**Frimodt** Rasmussen



**Jensia** Højgaard Kjærbæk



**Rósa** Samuelsen



**Hanna** Ovadóttir



**Johan** Dahl



**Sámal Hanni** Lognberg

# Modernisering
# av ríkisfelagsskapinum

Sambandsflokkurin arbeiðir áhaldandi fyri modernisering av ríkisfelagsskapinum. Endamálið er at laga samfelagið og vinnuna til tær avbjóðingar og tey krøv, sum sett verða komandi árini.

Samstarvsráðið er ein dagføring og nútímansgerð av samstarvinum og innihaldinum í ríkisfelagsskapinum. Eitt samstarv skal eisini gerast á parlamentariskum stigi millum uttanlandsnevndirnar í londunum í ríkisfelagsskapinum.

Føroyar hava framhaldandi tørv á at virka frælsari á uttanríkispolitiska økinum. Vit skulu virka meira sjálvstøðugt í samráðingum av politiskum og handilsligum týdningi fyri Føroyar.

Sambandsflokkurin hevur søguliga við sínari umboðan á Fólkatingi víst í verki, at flokkurin megnar at skapa úrslit føroyingum at gagni. Hetta er gjørt við einum semjusøkjandi politikki og í tøttum samstarvi við eitt nú samstarvsflokkin Vinstra.



# Nøkur avrik
# frá farnu setu

### Havgransking í Norðuratlantshavi

25,5 mió. kr. játtaðar til gransking í havinum kring okkum.

### Fongsul í Føroyum

Í 2022 varð avtalað at byggja nýtt fongsul í Føroyum. Sambandsflokkurin á Fólkatingi fekk á fíggjarlógini 2021 játtaðar 1,5 mió. kr. til eina kanning um viðurskiftini hjá føroysku kriminalforsorgini.

### Nýggjan Sóljubuss

Í 2020 játtaði danska stjórnin 600.000 kr. til Trivnaðargrunnin hjá Sjúklingahotellinum Tórshavn, sum skuldu brúkast til at fáa til vega nýggjan Sóljubuss.

### CPR-nummar og danskt NemID

Tætt samstarv millum donsku og føroysku stjórnina hevði við sær, at tað eydnaðist at samtykkja lógaruppskot um CPR-nummar og danskt NemID til føroyingar í 2020.

### Norðuratlantisk filmspulja

Á fíggjarlógini 2021 játtaði danska stjórnin 26,8 mió. kr. til eina norðuratlantiska filmspulju, sum m.a. skal vera við til at upplýsa partarnar í ríkisfelagsskapinum um ymisku mentanirnar, so at vit kunnu beina fyri fordómum og betra samstarvið okkara millum.

### Sjómaq

Sambandsflokkurin og IA hava saman við Dansk Ungdoms Fællesråd stovnað eina verkætlan, ið skal styrkja sambandið millum ung í ríkisfelagsskapinum. Verkætlanin gevur ungum møguleikan at ferðast og samstarva í ríkisfelagsskapinum.




## Fylg okkum